# Ingibjørg misti pápan skaðadagin í Hesti í 1919

**Fyri 90 árum síðani hendi ein ræðulig vanlukka í Hesti, sum kostaði meira enn einum tíggjundaparti av fólkatalinum lívið. Eftir einum degi hvurvu tveir bátar við 11 monnum. Eftir sótu foreldur, systkin, einkjur og børn. Vit hava hitt einasta barn, sum tá mistu pápan, og sum enn er á lívi, og vit hava fingið hennara søgu**

Sum vit øll vita er okkara søga fylt við syrgiligum ársdøgum fyri tær stóru vanlukkurnar, sum raktu okkara fólk.

Vit hava í ár umrøtt fleiri av teimum rundu og hálvrundu árstølunum fyri hesum hendingum. Hetta er gjørt út frá tí, at tíðin gongur skjótt, og skal søgan fáast frá teimum, sum sótu eftir, er einki at bíða við.

Í ár eru 75 ár síðani, at Neptun og Nólsoy gingu burtur við 43 monnum. Tað eru nokk so nógv fólk, sum minnast hesar tilburðir, og tí eru teir hampiliga væl varðveittir. Tí hava vit eisini kunnað skrivað ein stóran part av hesi søgu niður, sum vit hava havt í Miðvikuni í summar.

Í ár eru eisini 85 ár síðani, at Generel Gordon og Anna gingu burtur. Her eru sjálvsagt færri avvarðandi eftir, men so heppið var tað, at tað er eydnast at fáa hesar tilburðir hampuliga væl lýstar, eisini av fólki, sum mintust hetta. Tað hevur eisini víst seg, at serliga tey avvarðandi eru fegin um, at henda søgan verður varðveitt á prenti.

Verður farið longur aftur í tíðini, so er tað í ár 90 ár síðan tann "stóra skaðadagin" í Hesti. Og so heppið er tað eisini í hesum føri, at enn er eitt av børnunum, sum misti pápan tá, á lívi og kann greiða væl frá umstøðunum hjá teimum, sum sótu eftir.

Hetta er tann 94 ára gamla Ingibjørg Hansen, ættað úr Hesti, sum vit hava hitt á sambýlinum Gøtubrá í Norðragøtu, har hon býr nú.

## Nógvir skaðar í Hesti

Fyrst skal takast eitt sindur aftur í søguna um vanlukkur í Hesti. Hesa greiðir Jóan Christian Poulsen frá í síni Hestsøgu. Hestmenn hava altíð søkt bjørgini, og nógvar frásagnir eru um menn, sum eru dotnir oman í bjørgunum.

Tað vóru eisini nógvar hendingar, tá ið menn fórust á báti. Men í 1912 hendir tann vanlukkan, at sluppin Olivia hjá Pola í Dali gongur burtur undir Íslandi og allir fórust. Tá vóru fýra mans úr Hesti við.

Teir vóru Petur á Kletti við tí eldra soninum Petur Jákup, Anton Danielsen á Nýlendi og Martin norðan fyri Garð.

Anton var pápabeiggi Ingibjørg. Kona hansara æt Hanna. Tey áttu ein son Jens Kristian, sum var abbi Høgna Hoydal. Hann var pápi mammu hansara Gunnvør Hoydal.

Árið fyri í 1911 fór Jógvan Danielsen úr Andrassstovu fyri borð av skipi á Havnarvág og druknaði.

Í 1919 er tað, at stóri skaðadagurin kostaði 11 monnum lívið. Hetta merkir, at árini 1911-1919 misti Hestur 16 mans í bestu árum. Tað ber illa til at ímynda sær, hvør vanlukka, tað hevur verið fyri bygdina. Umframt saknin og sorgina var hetta meira enn helvtin av arbeiðsføra mannfólkinum í bygdini.

Seinni fórust fleiri mans á sjónum, og hetta gav íblásturin til Johan Niclassen at fáa ein svimjihyl í Hesti, so menn í hvussu er skuldu duga at svimja, um illa vildi til.

Men hetta er eisini enn ein søga um, at fólkið kláraði at fóta sær, hóast slík bakkøst, og her var tað aftur kvinnurnar, sum vóru hetjurnar.

## Ingibjørg greiðir frá

Ingibjørg minnist væl til og dugur væl at greiða frá eisini viðurskiftum undan hennara tíð og greiðir hon frá:

Mamma kallaðist Marianna f. Joensen. Hon átti trý systkin: Johanna Maria, kallað Mia, var ógift og búði hjá ommu. Amalia, kallað Malla, giftist til Havnar við Nikláa Skála, mest kendur sum fergumaður saman við beiggja sínum Tom. Thomasia doyði 15 ára gomul av menigitis, og so var tað Jógvan, sum var ógiftur og búði í Hesti.

Pápi var Dánjal Danielsen. Beiggjarnir hjá honum vóru Anton, sum gekk burtur við Oliviu, og Jens, sum fall í bakkanum í 1894, bert 18-19 ára gamal. Teir vóru fimm mans, sum fóru út um oynna at draga lunda, og tað leyp oman yvir teir. Umframt Jens umkomst eisini Jóhannis í Nýggjustovu.


*Hestur og Koltur sæð frá Kirkjubø*


*Ingibjørg minnist, tá ið hon misti pápan í 1919*

## Hestur var framkomin bygd

Tað var nokk so framkomið í Hesti, tá hugsað verður um støddina á bygdini, og hvussu avskorin hon var við nútíðar eygum. Telefon komu longu út í Hest í 1906, sama ár sum fyrsta telefonin í Føroyum. Tá varð vatn eisini innlagt í húsini. Hetta hevur bert verið fá ár aftaná Havnina, sum fekk vatn í 1898. Men tað, sum er eins áhugavert, er, at opnu køstarnir longu áðrenn eg minnist vóru avtiknir. Eg minnist ongan opnan køst, meðan tað framvegis vóru opnir køstar, táið eg kom til Gøtu í 1946.

Komandi summar eru 100 ár síðan kirkja kom í Hesti. Pápi og mamma vóru fyrsta brúðarparið, sum varð gift í kirkjuni, og tað var 20. november 1911. Men kirkjugarðurin kom í 1901. Áðrenn tað vórðu líkini førd til Kirkjubøar at verða jarðað.

Pør giftust gjarna í Kirkjubø ella í Havn.

Prestur kom javnan út í Hest. Annars var deknur, sum tað framvegis er.

Tann seinasta vanlukkan í bjørgunum undan míni tíð var í 1905, tá ið feðgarnir Oluf og Zacharias Zachariassen duttu oman.

Men skaðadagin í 1919, tá ið eg misti pápa mín, havi eg eina hóming um. Eg gekk á fjórða ári tá. Eg fylti fýra ár í september, sum vanlukkan hendi í apríl. Pápi fórst við tí fyrra bátinum, sum hvarv.

Eg minnist, at tað kendist, sum um tað var nakað, sum var undarligt. Mamma situr undir mær um morgunin.

Omma kemur inn, og nú sigur mamma: "Eru